| | | |
|---|---|---|
| **LD-Vegleiðing** | Dato 9. desember 1999 | Ár-nr. **1999-12** |
| Til **Aðalstýrini** | LD j. nr. 8203-78-2/99 | Síða |
| Heiti **Vegleiðing um endurgjald fyri eftirløn hjá tænastumonnum, sum eru fluttir frá danska statinum undir føroyska heimastýrið til at gera tænastu sum føroyskir tænastumenn** | | |

**1) Inngangur**

Føroya Landsstýri og danski staturin hava sambært undirskrivaðari avtalu, dagfest 6. februar 1981, og ískoyti til hesa, dagfest 10. mai 1990, gjørt semju um býtið av eftirlønarútreiðslum fyri tænastumenn hjá statinum, sum eru fluttir yvir til føroyska heimastýrið og settir sum landsins tænastumenn.

**2) Hvør kemur undir avtaluna**

Henda avtalan er galdandi fyri tænastumenn og eftirlivandi hjúnafelagar og børn teirra, sum vóru settir á niðanfyri nevndu stovnum, tá ið teir vóru yvirtiknir:

**Postverk Føroya** frá 1. apríl 1976
**Statshospitalið** frá 1. januar 1977
**Statens Specialskole i Thorshavn** frá 1. august 1976
**Særforsorgen på Færøerne**
**Færøernes Seminarium**

Harumframt fevnir avtalan um útreiðslur til eftirløn v.m. til teir limir í **Pensionsordningen af 1976**, sum tann 31. desember 1987 starvaðust á:

**Færøernes Specialskole**
**På Fritids- og Aflastningshjemmet**

teir limir í Pensionskassen for Erhvervsskoler, sum tann 31. desember 1987 starvaðust á:

**Thorshavns Handelsskole**
**Thorshavns Tekniske Skole**
**Klaksvig Tekniske Skole**

Teir limir í **Efterlønskassen**, sum tann 31. desember 1987 starvaðust á:

**Adventisternes Ungdomsskole**

Og sum eftir 31. desember 1987 vóru framhaldandi í starvi á stovninum við varðveitslu av teirra higartil galdandi eftirlønarrætti til tey fara frá við eftirløn.

Ella fyri aðrar seinri yvirtiknar stovnar ella uppgávuumleggingar millum statin og heimastýrið (samanber § 2, stk.2).

**3) Hvønn skal endurrindast fyri**

Teir tænastumenn og starvsmenn ella teirra eftirsitandi, sum við yvirtøkuna vóru beinleiðis settir undir landsstýrinum sum landsins tænastumenn, og sum landið skal útgjalda eftirlønina til sambært § 10, stk. 2 í avtaluni.

**4) Hvat skal endurrindast fyri**

Eftirlønaraldurin, sum viðkomandi hevði vunnið sær sum danskur tænastumaður, skal endurrindast fult út av danska statinum. Uppgjørt verður tvær ferðir um árið, hvønn 1. januar og hvønn 1. juli.

Fyri uppsetta eftirløn tó ikki fyrr enn eftirlønin er fallin til útgjaldingar.

Endurrindast skal fyri:

a. Egineftirløn
b. Hjúnafelagseftirløn
c. Barnaeftirløn og barnaískoytiseftirløn
d. Eftirsitiløn til hjúnafelaga og/ella børn eftir virknan tænastumann eins væl og eftirløning
e. Útsett eftirløn
f. Eftirløn til áramálssettan og eftirlønarískoyti

**5) Uppgerð av eftirlønaraldri**

Uppgerðin verður í lutfallinum til vunnan eftirlønarrætt sum danskur tænastumaður og sum føroyskur tænastumaður. Samlaði eftirlønaraldurin verður tó ongantíð meir enn 37 ár.

Dømi: hevur tænastumaður vunnið sær 5 ára eftirlønaraldur sum danskur tænastumaður av samanlagt 19 eftirlønarárum, verður danski parturin 5/19 av útgoldnu eftirlønarupphæddini.

**6) Hvussu skal farast fram**

Tá ið tænastumaður ella starvsmaður søkir um at verða loystur úr starvi, skal stovnurin/stýrið útvega hesar upplýsingar um viðkomandi:

Navn á viðkomandi og p-tal
Sett-/ur í starv
Settur (yvirtikin) undir heimastýrinum
Farloyvi uttan løn
Dagur fyri loysan úr starvi ella deyðadagur
Roknaður eftirlønaraldur
Lutfalsliga býtið millum Føroyar og statin

Møgulig barnaeftirløn:
Navn, føðingardagur og p-tal.

Upplýsingarnar skulu sendast til tað stýrið í Danmark, sum viðkomandi var settur undir, tá ið hann/hon var dansktsett. Samstundis skal avrit av hesum skjølum, saman við útrokningum, sendast ríkisrevisiónini og statens regnskabsdirektorat.

Sama mannagongd verður at fylgja, tá ið tænastumaður/starvsmaður doyr ella tá eftirløningur doyr og eftirsitandi hevur rætt til eftirløn.

**7) Hvat er grundarlagið fyri endurrindingaruppgerðini**

Grundarlagið fyri uppgerðini eru donsku eftirlønarupphæddirnar ásettar av Finansstyrelsen.

Tí verður neyðugt hjá hvørjum aðalstýri/stovni sær at útvega hesar upphæddir frá Finansstyrelsen fyri alt tíðarskeiðið, sum endurrindast skal fyri.

**8) Hvønn uppgerðin skal sendast til**

Tá ið allar hesar upplýsingar eru tøkar, skal uppgerðin sendast til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, FO-160 Argir og skal hava Landsgrannskoðarans átekning. Føroya Gjaldstova sendir hana síðani víðari til avvarðandi ministeriið í Danmark.

**9) Hvussu leingi avtalan er galdandi**

Avtalan er galdandi so leingi viðkomandi, eftirsitandi og børn hava rætt til eftirløn.

*Argir 18. november 1999.*

Fíggjarmálastýrið

Lønardeildin